# ítróttur

Nr. 157 • fríggjadagur • 22. august 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ásgeir var ovurfegin

**Íslendski venjarin ásannaði, at hann var nógv fegnari um úrslitið, enn hann var um leikliga avrikið, sum hann í 2. hálvleiki metti at hava verið tað vánaligasta í hesi undankappingini**

ÍSLENDSKI VENJARIN
*Jóannes Hansen*

Tað gekk rúm tíð, áðrenn hann hitti føroysku pressuna. Íslendska sjónvarpið og íslendska útvarpið vildu hava hann fyri seg sjálvan í fitta løtu. Sigursrákin var søtur, og rímuligt vildu elektronisku fjølmiðlarnir luta rákan saman við venjaranum og ivaleyst sera fegnu viðhaldsfólkunum longri móti vestri í Atlantshavinum.

Tað er íslendska landsliðsvenjaran, sum vit tosa um. Fyrsti dysturin hjá honum var, tá ið Ísland í evstu løtu á heimavølli ímóti Føroyum vann 2-1. Síðani hava Ásgeir Sigurvinsson og hansara menn støðugt klatrað ímóti toppinum, og nú er tað upp til teir sjálvar at gera av, um tað skulu vera teir ella týsku favorittarnir, sum skulu tryggja sær beinleiðis atgongd til EM endaspælið, sum verður í Portugál næsta summar. Ásgeir Sigurvinsson hevur spælt fótbólt í sekstan ár í Týsklandi, so hann veit, hvat hann tosar um.

– Týskararnir eru framvegis favorittar. Men eg haldi, at vit hava møguleika ímóti teimum á heimavølli. Um vit vinna á teimum á heimavølli, so kann alt koma fyri, tá ið vit fara at spæla ímóti teimum á útivølli.

Ert tú ein fegin maður?

– Vit vistu, at tað fór at vera torført her í Føroyum. Vit komu eftir trimum stigum, og tað eydnaðist. Tí eri eg hjartans fegin. Men vit kunnu ikki vera nøgdir við leikliga avrikið. Í 2. hálvleiki vóru vit leingi undir trýsti. Tá spældu vit so mikið illa, sum vit ikki hava gjørt áður í hesi undankappingini. Samanspælið var vánaligt, og vit megnaðu ikki at fáa ferð á spælið. Um vit skulu vinna á týskarunum, so skulu vit spæla meiri sannførandi, enn vit gjørdu í dag, staðfesti dámligi íslendski venjarin, og hann legði afturat:

– Hóast vit ikki spældu so væl, so haldi eg, at sigurin var uppiborin. Í 1. hálvleiki áttu vit at havt skorað eitt ella tvey mál afturat.

Heldur tú, at føroyska liðið hevur møguleika at fáa stig í tveimum teimum síðstu dystunum, sum eru á útivølli ímóti Skotlandi og á heimavølli ímóti Litava?

– Hygg eftir úrslitunum higartil. Uttan mun til hvørji londini hava verið, sum hava spælt ímóti hvørjum øðrum, so hevur talan verið um sigrar við einum og hægst tveimum málum. Tí ivist eg einki í, at Føroyar hava møguleikar. Bæði ímóti Skotlandi og Litava, og so ynskti føroyska pressan Ásgeiri Sigurvinssyni og hansara monnum alt tað besta í stríðnum fyri at røkka endaspælinum í Portugál.



*– Týskararnir eru framvegis favorittar. Men eg haldi, at vit hava møguleika ímóti teimum á heimavølli, helt íslendski landsliðsvenjarin eftir dystin*

# Gullnál til Torleif

**Undan dystinum mikudagin varð Torleif Sigurðsson kosin heiðurslimur hjá FSF, og fekk hann í hesum sambandi eina gullnál við bjálka**

HEIÐURSLIMUR
*Jákup Mørk*



*Torleif Sigurðsson fær her handaða gullnál við bjálka umframt heiðursbræv frá núverandi FSF-formanninum, Dánjal Andreasen, sum sjónligu tekini um, at hann nú er heiðurslimur hjá Fótbóltssambandinum*

*Mynd: Jan Müller*

Tað er neyvan nakar fótbóltshugaður føroyingur, sum ikki kennist við Torleif Sigurðsson. Fyrrverandi fótbóltsbossurin var í mong ár synonymur við føroyskan fótbólt, og ikki minst var hann ein av krumtappunum í arbeiðinum at fáa føroyskum fótbólti altjóða góðkenning.

Tað er nú hálvt annað ár síðani, at hann á FSF-fundi í Norðurlandahúsinum takkaði fyri seg, og mikudagin kom so higartil seinasta viðurkenningin fyri arbeiði hansara, tá hann varð kosin heiðurslimur í Fótbóltssambandinum. At hetta so varð gjørt samstundis sum FSF-bygningurin endaliga varð tikin í nýtslu, var sum so sera hóskandi, tí eftir altjóða góðkenningina vóru júst hølisviðurskiftini hjá FSF eitt av aðalmálunum hjá Torleifi. Eitt mál, sum hann gekk somikið høgt uppí, at hann tað eina árið setti formanssessin upp á spæl hesum viðvíkjandi.

Umframt Torleif eru tað bert Hallgrím Gregersen úr Gøtu og Hjalmar Joensen úr Fuglafirði, sum eru kosnir heiðurslimir hjá Fótbóltssambandinum.

**ALT** til skrivstovuna - og eitt sindur afturat...

STIFTBLÝANTAR
nógvir ymsir litir
kr. 10,-

YVIRSKRIVINGARPENNAR
í ymsum litum
úr kr. 5,50

LUMMAROKNARAR
til framhaldsdeild og hægri útbúgvingar
úr kr. 149,-

SKÚLAHEFTI
kr. 3,-

A4 SKRIVI- OG ROKNIBLOKKAR
5 stk. kr. 39,-

SKÚLATASKUR
fleiri snið og litir
úr kr. 350,-

PENNAHÚSAR
í ymsum litum
Fyltir pennahúsar kr. 99,95
kr. 75,-

BRÆVORNARAR
í nógvum litum
kr. 22,50

FARODANE City
SKRIVSTOVUMARKNAÐUR

Smyrilsvegur 7
FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 14 14
www.farodanecity.fo





*Eiður Smári Gudjohnssen fegnaðist um stigini, men ásannaði samstundis, at enn restar nakað í, um Ísland skal gera sær vónir um annan av fremstu sessunum í bólkaspælinum*

*Mynd: Jan Müller*

# Sigurin altavgerandi

**Hóast hann ikki var heilt nøgdur um spælið, so var Eiður Smári Gudjohnssen ovurfegin um sigurin mikukvøldið**

LEIKARAPRÁT
*Jákup Mørk*

Stóra stjørnan á íslendska liðnum er uttan nakran sum helst iva Eiður Smári Gudjohnssen. Seinnu árini hevur hann hildið til í enskum fótbólti, har framvegis er ein partur av Chelsea-liðnum, hóast russiski Roman Abrahamovic hevur sprænt hundraðtals milliónir inn í felagið.

## Stigini telja

Tí var ikki annað enn náttúrligt, at tað fyrst og fremst var hann, sum miðlarnir flokkaðust um eftir dystin, og tolin svaraði hann so teimum spurningum, sum vórðu settir.

Spurdur um sjálvan dystin, helt Eiður Smári fyri, at fyri seg hevði úrslitið alt at siga.

– Hatta ráddi ikki um at spæla vakran og poleraðan fótbólt. Tað ráddi um at fáa trý stig, og tey fingu vit eisini. Tað var altavgerandi.

– Men tað skerst tó ikki burtur, at tað vóru løtur í dystinum, har vit als ikki sýna tað spælið, sum eiga at megna. Vit byrja annars væl, og fáa alt fyri eitt lagt trýst á, men tá vit so hava skorað, fánar spælið meira ella minni. Snøgt sagt, so geva vit føroyska liðnum alt ov nógv pláss, soleiðis at tað so við og við gerast teir, sum trýsta okkum, og tað kostar so eisini eina útjavning fyri okkum. Tíbetur megnaðu vit kortini at vinna dystin, men tað er heilt víst, at hetta er nakað, sum skal betrast til komandi dystirnar.

## Koyri á í Skotlandi

Eftir sigurin á Føroyum, so er Ísland nýtt oddalið í okkara undankappingarbólki, men hóast hetta, so er Eiður Smári ikki alt ov bjartskygdur, tá tosað verður um, hvørt Ísland fyri fyrstu ferð kann standa við møguleikanum at spæla seg víðari í endaspælið, tá bólkaspælið er av.

– Sigurin í dag førir sjálvandi við sær, at vit enn hava møguleikan, men hetta hevur verið ein løgin bólkur. Eitt nú høvdu vit sjálvir staðið við øllum trumfunum, um vit bara høvdu vunnið heimadystin móti skotum, men tað eydnaðist so ikki. Nú mugu vit so bara royna at gera nakað við Týskland, tá teir koma á vitjan. Megna vit tað, so hava vit framvegis møguleikan, og so vóna vit sjálvandi, at Føroyar fara at gera okkurt við Skotland. Tað er í øllum førum heilt víst, at tann dystin fer øll íslendska tjóðin at rópa á Føroyar, var seinasta heilsanin, sum vandamikli álopsmaðurin hjá Íslandi hevði at bera føroyska liðnum.

# Fleiri flokkar betri enn seinast

**Hóast hann enn eina ferð hevði verið vitni til, at liðið hjá honum hevði tapt tepra uppgerð, so segði Henrik Larsen seg hava verið stak væl nøgdan við leikliga avrikið**

FØROYSKI VENJARIN
*Jóannes Hansen*



*Henrik Larsen heldur, at stigini koma alsamt tættari, og at tað skjótt fer at hepnast hjá okkara monnum at fáa okkurt stigið afturat roknskapinum*

Hann líktist ikki einum tapara. Venjarin hjá føroyska fótbóltslandsliðnum, Henrik Larsen, segði seg vera væl nøgdan við tað, sum liðið hjá honum hevði víst:

– Um vit sammeta við dystirnar fyrr í summar í Íslandi og á heimavølli ímóti Týsklandi, so spældu vit ikki væl tær ferðirnar. Hesa ferð var leikliga avrikið kanska 50 prosent betri, enn tað var tær báðu ferðirnar. Spælararnir hjá okkum megnaðu væl at finna hvønn annan alla tíðina, og serliga í 2. hálvleiki bar tað til at leggja trýst á mótstøðumenninar. Tað var, sum tað skuldi vera. Men tíverri vóru vit óhepnir. Jákup fór skeivur av hornasparksinnlegginum, og teir vóru nóg professionellir at sekta mistøkini hjá okkara monnum. Soleiðis er tað bara. Vit stríddust, og ter fingu bílig mál, staðfesti Henrik Larsen.

Umhugsaði tú ongantíð at flyta Jón Róa Jacobsen úr miðverjuni og fram í álopið fyri at fáa uppaftur størri tyngd í framrættaða partin?

– Tann hugsanin var uppi og vendi eina løtu, men hon varð slept aftur. Hann var tryggur í miðverjuni, og fleiri ferðir var hann væl við í uppspælinum til álop, sum kundu havt borið møguleikar við sær. Eg haldi, at innskiftu spælararnir stóðu seg væl.

Hví skifti tú Pól Thorsteinsson út?

– Tí hann hevði trupulleikar við hælsinuni. Tað hevði einki við avrikið hjá honum at gera.

Landsliðsvenjarin sigur seg framvegis hava mót um, at tað skal eydnast at fáa fleiri stig í hesi EM undankappingini:

– Stigini koma tættari og tættari. Nú hava vit fleiri ferðir havt marginalirnar ímóti okkum. Vit eiga at trúgva upp á, at tað fer at bera til. Leikliga avrikið vísti okkum, at tað kann bera til. Eg eri sannførdur um, at leikliga menningin fer at síggjast aftur í úrslitum, sum fara at bera størri úrtøku við sær, segði Henrik Larsen.

TASKI gólvvaskimaskinur

-øll model við innbygdum lagri!

Frá okkara leverandøri hava vit fingið tilboð uppá avmarkaða nøgd!

TASKI gólvvaskimaskinur

-til óveruligar prísur!

Spar upp til nógvar túsund krónur!

Til dømis:
TASKI 800 vanligur prísur kr. 76.735,-
**Nú** **kr. 55.600,-**
við MvG - frítt leverað

Skulu tygum keypa gólvvaskimaskinur er nú møguligt at velja millum fleiri ymiskar við stórum avsláttri.

Ongantíð verið bíligari! Keyp NÚ! Avmarkað nøgd!

Vælegnaðar til lagurbygningar, handlar, skúlar v.m.

Ring og hoyr nærri!

A. H. Jensen
alt innan reingerð

Stoffalág 25 • FO-100 Tórshavn
tlf.: 322676 • fax: 318101
e-mail: a_jensen@post.olivant.fo